tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 13 Fríggjadagur 19. januar 1996 70. árgangur Krónur 7,00

### *Á útlendsku uppboðssølunum:*
# Føroyingar svika við tølunum

*– Føroysku fiskimenninir mugu fara á skeið fyri at síggja munin á longu og toski, sigur Jákup Mørkøre, nevndarlimur í Fiskavirking. Hagtølini sýna at longuveiðan undir Føroyum er økt við slakari helvt. Hann veit dømi um at menn eru spurdir av útlendskum uppboðshaldarum um, hvussu nógv teir skulu skarva av toskanøgdini, fyri at hækka prísin og drúggja kvotuna.*





# Løgmaður boðsendir landsverkfrøðinginum á fund

*Hørðu atfinningarnar frá landsverkfrøðinginum í Sosialinum móti landsstýrinum komu ávart á løgmann. Hann hevur tí boðsent landsverkfrøðinginum og oljufyrisitingini til fundar*

síða 21

### *Reiðarin viðgongur:*
# Prísurin er góður, men svinnið stórt

*Osmund Justinussen, reiðari ,sigur, at prísurin er góður á útlendsku uppboðssølunum, men vektin vignast ógvuliga illa*

Lesið um ísfiskalandinga:nar uttanlands á síðu 7

# Lívstekn frá horvnum oyndfirðingi

síða 3

### *Úr løgtinginum:*
# Heitt orðaskifti um Klaksvíkar Sjúkrahús

fk
HVØNN DAG Í JANUAR!
Døgurði
fyri
BERT 20 kr.!
– bert galdandi, um etið verður í matstovuni –
Matstovan í Hoyvík

*Aftaná atfinningarnar hjá landsverkfrøðinginum í Sosialinum:*

# Løgmaður boðsendir pørtunum í oljumáli

*Hørðu atfinningarnar hjá landsverkfrøðinginum móti landsstýrinum í Sosialinum í gjár koma fullkomiliga óvart á løgmann. Hann heldur málið verða so álvarsligt, at hann hevur boðsent bæði landsverkfrøðingstovni og oljufyrisiting til fundar*





Samrøðan í Sosialinum í gjár, har landsverkfrøðingurin Henning Jacobsen finst at landsstýrinum og skuldsetur tað fyri als ongan áhuga at vísa landsverkfrøðingsstovninum í sambandi við fyrireiking og menning av eini oljuvinnu hevur givið løgmanni kaldasveittan um pannuna. So meint hava úttalilsini hjá landsverkfrøðinginum rakt, at Edmundur Joensen, løgmaður rætt og slætt hevur gjørt av at innkalla partarnar í málinum til fundar í Tinganesi í dag klokkan 10.

-Hetta kemur heilt óvart á meg og tí havi eg tikið av leiðingina av tí og boðsent umboðum fyri bæði landsverkfrøðingsstovnin og oljufyrisitingina at møta í landsstýrinum sigur Edmund Joensen í eini viðmerking.

Løgmaður sigur, at tað frá landsstýrisins síðu so avgjørt er lagt upp til, at føroyingar skulu samarbeiða nú vit m.a. fara undir at bora í Lopra.

**Løgmaður Edmund Joensen vil hava at vita, hvat orsøkin er til ónøgdina og atfinningarnar móti landsstýrinum hjá Henning Jacobsen, landsverkfrøðingi í Sosialinummi gjár. Hann hevur boðsent landsverkfrøðingimnum og leiðaranum á oljufyrisitingini til fundar í dag. Av tí at Martin Heinesen er burturstaddur møtir Tina Hansen.**

Men her er so bert talan um eitt avmarkað projekt, sum oljulógini sjálvi gjalda.

Hann vísir á, at í sambandi við Lopranprojektið, so varð ætlanin at landsverkfrøðingurin skuldi gera økið klárt, men hesum var vinnan ímóti, tí danska felagið var í Føroyum herfyri fyri at kunna um projektið.

Løgmaður sigur, at vit í framtíðini mugu hava fyri eygað, at føroyingar samarbeiða væl og virðiliga, og vit mugu ansa eftir, at ekspertisan er í landinum.

Uppá fyrisspurning hvat hann hevur at siga til úttalilsini hjá landsverkfrøðinginum um, at myndugleikarnir beinleiðis hava mótarbeitt stovninum sigur løgmaður, at tað kennir hann einki til. Tað er honum fullkomiliga ókent.

Um her verður hugsað um, at stovnurin ikki hevur umboð í oljuráðleggingarnevndini, so er tað at siga at har eru so nógvir stovnar, sum kundu ynskt sær eitt umboð. Fiskirannsóknarstovan, Heilsufrøðiliga Starvsstovan, skattasérfrøðingar ofl. høvdu uttan iva kunnað hugsað sær at havt umboð í nevndini, men tað hevði verið ov nógv. Tað hevði verið vonleyst at arbeitt við slíkari nevnd.

Løgmaður heldur ikki, at slíkt skal fara fyri, at sérkunnleikin er í landinum og at stovnar samarbeiða um nakað er at samarbeiða um.

Edmund Joensen sigur, at tað er ikki ætlanin hjá landsstýrinum at forbiganga ein stovn við ekspertisu, um hann kann brúkast í hesum høpinum.

-Alt, sum er natúrligt at gera hjá landsverkfrøðingsstovninum, tað átti hann sjálvsagt at luttikið í. Men sjálvandi mugu vit eisini taka hædd fyri tí privatu vinnuni. Tá er trupulleikin ein annar, tí tá er áhugin annars í samfelagnum. Hjá hesum stovni vil tað tí vera ein ballansugongd, tí hann er almennur stovnur, men hann skuldi verið ein góður samskipari.

jan


## Almannastovan

Søkt verður eftir

### Stuðulsfólki

til eitt 7 ára gamalt barn, búsitandi í Eysturoy.

Arbeiðstíðin verður 15 tímar um vikuna eftir skúlatíð, og er játtanin fyribils til 30.06.96

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Almannastovuna, Eysturoyar deild

Løn- og sáttmálaviðurskifti sambært avtalu millum Føroya Landsstýri og Føroya Pedagogfelag.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 02.02.96 og sendast til:

Almannastovuna
Eysturoyar deild
620 Runavík

## Blaðfólk

Tíðindablaðið Sosialurin søkir eftir útbúnum journalisti ella øðrum fólki við hegni og royndum í skriving at byrja 1. februar ella eftir nærri avtalu

Hevur tú kreativ evni og hug at arbeiða í einum spennandi og fjølbroyttum arbeiðsumhvørvi, so er Sosialurin júst eitt arbeiðspláss fyri teg.

Fyrimun hava tey, ið

- hava royndir at arbeiða við teldu
- eru stinn í føroyskum
- hava góð samstarvsevni

Hevur hetta tín áhuga, so lat okkum frætta frá tær.

Umsóknir við møguligum prógvum, ummælum v.m. skulu sendast til:

Tíðindablaðið Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn
merkt »umsókn«

í seinasta lagi hósdagin 25. jan. 1996.

**Sosialurin**

## PIZZA-VINIR

Hevur tú hug at fáa eina ella fleiri **PIZZA** inn á gólvið, so ring **tlf. 18866**, og tú hevur PIZZA'ina innan ein tíma.

Vit í **PIZZARIA** royna altíð at hava kostnaðin so lágan sum møguligt, soleiðis at kundin bert rindar 30 kr. fyri heimkoyringina. *Hetta tilboð er to bert galdandi fyri viðskiftafólk í Tórshavn.*

Vit vóna, at hetta tilboð kemur væl við.

**PIZZARIA - Tlf. 18866**

## Lýsingartorgið

nú hvønn dag

**Tað rætta lýsingartorgið - bara í Sosialinum FIMM ferðir um vikuna**